# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hvar er og hvat vil løgmaður!

Tað er farið at sansað alvorliga at hjá løgmanni, nú samgongan bert hevur fimm mánaðir eftir í Tinganesi. Nýggi fíggjarmálaráðharrin hevur fleiri ferðir alment og sum skilst eisini innanhýsis sagt løgmanni, hvar skápið skal standa. Løgmaður legði herfyri út við einum úttalilsi, ið ikki fall í góða jørð hjá sambandsformanninum, um at nýggi maðurin í landsstýrinum mátti læra seg politiska handverkið eisini. Síðani hava bæði javnaðarmenn og fólkafloksmenn lagt harðliga út eftir Laksáfoss, men trýst elvir til móttrýst, og bráddliga fær hann hjálp frá nógvum síðum. Sambandsmenn koma kropp á kroppi og geva síni nýggju stjørnu stuðul. Poul Michelsen kemur nú eisini honum til hjálpar.

Tað, ið ørkymlar, er, at løgmaður skal hava fingið Laksáfoss at ganga við til at skerja í rakstrinum á fíggjarlógini heldur enn røra við íløgurnar, nakað, ið mong síggja sum reinan fólkaflokspolitikk. Hvat siga javnaðarfólk til hetta! Vit vita, at skal strammast í á fíggjarlógini, so fer hetta at ganga út yvir tey alment settu, tey, ið Javnaðarflokkurin plagar at verja. Hvussu kann løgmaður nú liva við, ja hann hevur entá sjálvur givið Laksáfoss boðini, ið bera í sær, at tað vera uppsagnir hjá tí almenna. Og samtíðis krevur Strømmurin fleiri pengar.

Tey eru mong, sum taka seg til høvdið og spyrja, um løgmaður er við at fremja politiskt harakiri. Onkur spyr entá, um løgmaður longu man hava givið skarvin yvir, nú hann innsær, í hvussu stóran mun hann hevur lagað politikkin eftir Fólkaflokkinum, ja at hann entá ikki setir seg føran fyri at fara í eitt valstríð, sum heilt vist fer at verða merkt av eini sera stórari ónøgd millum ikki minst javnaðarfólk fyri tann "í lummanum á Fólkaflokkinum" rikna politikkinum í Tinganesi!!!

Tað, sum er minst haldbart fyri løgmann og Javnaðarflokkin, nú val nærkast, eru manglandi útspælini frá løgmanni og mótsigandi útspælini frá hansara egnu monnum. Fólk spyrja, um løgmaður ikki í ov stóran mun hevur girt seg inni á "forsetaborgini" í Tinganesi sum tann alfaðirligi forsetin og harvið hevur gloymt bæði sítt egna bakland, flokkin og fólkið! Eingin ivi er hinvegin um, at í øllum flokkum hava fólk stóra virðing fyri løgmanni, tá hann traðkar fram sum landsins hægsti maður. Hann er tignaðarligur, skilagóður og virðiligur og dugur væl at umboða tjóðina. Men hví girðir sami løgmaður seg inni á forsetaborgini, tá politiska og samfelagsliga vindmegin fer upp um 20 m/s? Tá tað um stórmál sum bankasølu og aðrar aktuellar samfelagsligar spurningar ræður? Løgmaður er alt ov lítið sjónligur í dagliga samfelagskjakinum. Nú at stíga fram stutt fyri eitt val kann sjálvandi bøta um hetta undirskot, men tað kann eisini gerast ein boomerangur, tí tá er álitið kanska longu fokið.

**Sosialurin**

## Magni Laksáfoss hevur púra rætt!

**Við nýggja landsstýrismanni Sambandsfloksins Magna Laksáfoss fekk samgongan ein ikki minni dugnaligan fíggjarmálaráðharra enn undanfarna. Hví? Tí sambandshugsanin byggir ikki á kenslur, sum hjá øllum hinum flokkunum, men á sunna fornuft**

JOHAN PETERSEN



Søgan endurtekur seg ferð eftir ferð. Tá ið hinir flokkarnir hava koyrt landið fast fíggjarliga, eru altíð boð eftir Sambandsflokkinum at fáa landið aftur á beint. Hetta hendi í 1966, 1980, 1989, 1994 og nú aftur í 2004.

Sambandsflokkurin byggir á sunna fornuft, hinir flokkarnir bygga á kenslur.

Orsøkin til, at hinir flokkarnir altíð koyra landið fast er, at teirra politikkur byggir á kenslur, og kenslur hava sum kunnugt onki við fornuft at gera. Sambandsfloksins politikkur byggir hinvegin á sunna fornuft, og tað er tað íð ger, at tað bert er Sambandsflokkurin, sum kann bjarga Førjum tá ið á stendur.

Eftir vanstýring í 6 ár, har loysingarflokkarnir í kenslurúsi hildu seg kunna gera Føroyar leysar av Danmark og høvdu søplað eitt yvirskot á fíggjarlógini upp á 600 mió kr. burtur og lótu eftir seg eitt stórt hall upp á 150 mió. kr., vóru boð aftur eftir Sambandsflokkinum, og við Bárði Nielsen sum fíggjarmálaráðharra eydnaðist at venda skútuni aftur á beint. Landsstýrissamgongan hevði ein sera góðan fíggjarmálaráðharra í landsstýrismanni Sambandsfloksins Bárði Nielsen – ja so góðan, at hann bleiv headhuntaður til landsins størstu verkætlan nakrantíð.

**Magni Laksáfoss vísir á møguleikar**

Politikkur Sambandsfloksins á fíggjarliga økinum eydnaðist so mikið væl, at longu nú, Magni Laksáfoss hevur tikið yvir eftir Bárð er neyðugt at repa seglini ella tálma búskapinum og soleiðis drýggja vælferðina, soleiðis at vit ikki seta alt yvir stýr, sum vit fyrr hava upplivað tað.

Hinir samgonguflokkarnir - teir nevna bert tiltøk, ið ikki skulu setast í verk - tykjast firtnir, nú landsstýrismaðurin kemur við uppskotum um, hvørji tiltøk kunnu setast íverk.

**Fulla undirtøku**

Hvat feilar so okkara samstarvsflokkum? Hví leika teir so í? Duga teir ikki at síggja, at neyðugt er við tiltøkum? Bert kenslubornir droymarar halda at trøini vaksa beinleiðis inn í Himmalin. Sjálvt patriarkurin Jákup kundi bert droyma hetta. Nei, neyðugt er at síggja veruleikan í eyguni, sum Magni Laksáfoss ger tað og seta tiltøk í verk, sum muna. Hann hevur fingið fulla undirtøku á landsstýrisfundi fyri tí, hann ger, ja, er enntá biðin um at seta tiltøk í verk.

Magni hevur eisini fullan stuðul í sínum baklandi, hóast Kringvarpið fær tað at ljóða beint øvugt. Sama tíðindaskriv sum stóð at lesa í bløðunum, har formaður Sambandsfloksins gevur landsstýrismanninum sín fulla stuðul, lesur útvarpið upp og sigur, at landsstýrismaðurin hevur ikki undirtøku, sjálvt ikki í sínum egna flokki. Sig so, at tey í útvarpinum ikki kenna republic service-skyldur sínar!

**Neyðugt at vísa á skeivleikar og ábøtur**

Hetta merkir sjálvsagt ikki, at Sambandsflokkurin ikki virðir samgonguskjalið – tað er eitt av eyðkennum Sambandsfloksins, at hann stendur við gjørdar avtalur. Men sjálvandi skal flokkurin kunna vísa á skeivleikar og ábøtur.

Bæði Bárður Nielsen og Magni Laksáfoss hava víst, hvussu sambandspolitikkur roynist í verki og at hesin politikkur er longst sum best.

## Heðin Mortensen pellar

**Róðrarfelagið Knørrur, høvuðsstaðarfelagið á Skálatrøð.**
**v/ Magnus Gaard**

Vísandi til grein á www.rogving.fo, endurgivin í øðrum miðlum, skal Róðrarfelagið Knørrur við hesum gera vart við, at Heðin Mortensen, borgarstjóri, ber fleiri ósonn tíðindi um neystaviðurskifti felagsins á Skálatrøð.

Vit halda, at Heðin sigur ósatt, tá ið hann fortelur, at økið hjá Róðrarfelagnum Knørri á Skálatrøð er friðað. Tað er tað ikki, sum vit vita um. Orsøkin til, at Róðrarfelagið Knørrur framvegis ikki hevur fingið byggiloyvi, tykist heldur liggja hjá Heðini Mortensen sjálvum, og tað hevði verið gott, um hann kundi fortalt okkum, hvør henda orsøk er.

Heðin sigur eisini ósatt, tá ið hann ber fram, at Róðrarfelagið Knørrur ikki hevur tikið av tilboði Býráðsins um at vera í roykivirkinum í Álakeri. Sum prógv fyri hesum verður víst til bræv okkara til Býráðið, dagfest 18. januar 2007, har vit námgreiniliga siga okkara hugsanir um bæði Álaker og Skálatrøð. Men sum so ofta fyrr, so svaraði Býráðið ongantíð aftur, og henda ódámliga tøgnin tykist eftirhondini vera eitt av arbeiðsamboðunum hjá borgarstjóranum.

Lesið annars brævið á www.rk.fo"

Og Heðin sigur ósatt triðju ferð, tá ið hann gyklar fyri fólki, at hann vil geva Róðrarfelagnum Knørri góðar umstøður. Hetta er prógvað við mongu, óaftursvaraðu brøvum og áheitanum okkara, hetta er prógvað við faktuellu umstøðum okkara, og hetta er ikki minst prógvað við ranga vitnisburði Heðins í seinastuni.

Men á ein hátt eru vit kortini glað um, at Heðin fer í miðlarnar við málinum. So kann almenningurin sleppa at síggja ta framferð, ið hann sum borgarstjóri og ítróttarforseti sýnir móti einum av ítróttarfeløgunum í býnum.

PS:Hesum orðum okkara kann Heðin Mortensen nú lættliga gera til skammar við at seta ferð á málið um byggiloyvið á Skálatrøð. Tað hevur hann allar møguleikar til, tí har er einki, sum forðar honum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.